## KROSSORÐ



**Vinnari:**

*Kai Vágfjall*
*Postsmoga 73*
*110 Tórshavn*

### Loysnin frá seinastu viku
### Loysunarorðið: UNDANTAKIÐ



### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ..........................................  **425**

Navn: ..........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkur** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***

# Útgávukonsert við Högna í Mentanarhúsinum

**TÍÐINDASKRIV**

Tvinnir G!-aktuellir sangarar og sangskrivarar fara fríggjakvøldið á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirð at hita upp til G!

Högni Lisberg, ið gevur spildurnýggja flögu út í næstum, fer á pall saman við bólkinum hjá sær og Marius, ið somuleiðis arbeiðir við nýggjari solo flögu og eisini hevur bólk aftrat sær, fer at hita upp.

Högni og Marius teljast millum unga og virkisfýsna ættarliðið av föroyskum tónleikarum, sangarum og sangskrivarum, ið ikki smæðist burtur, men fer ágrýtið út í heim við tónleikinum. Högni hevur havt nógvan vind í seglunum seinastu árini og spennandi verður framhaldandi at fylgja við hvussu honum gongst á altjóða tónleikapallinum. Fyrra útgávan "Most Beautiful Things" fekk góða umröðu í fleiri londum, og hin seinna útgávan sigst at vera enn betri í dygd og verki. Hon er upptikin í teim högt virdu Lundgaard Studios í Danmark, og verður í lötuni miksað liðug í Belgia. Vit kunnu ikki annað enn gleða okkum at hoyra flöguna.

Marius (Hans Marius Ziska) var í fleiri ár oddafiskur í popp/rokk bólkinum Flux har hann sang, spældi gittar og smíðaði öll tey serstakliga íoyrafallandi lögini. Nú er hann farin í holt við solo verkætlan undir egnum navni, og áhugavert verður at hoyra nýggju lögini á flögu og ikki minst á konsert.

Dyrnar lata upp kl 21.



## VIÐMERKINGAR

# Tíðin rennur sum streymur í á

**Hjalmar N. Poulsen**
*Maskinmeistari*

Nú dagur dettur av degi, og vikan er runnin, síðan organiseraða reyvrenningin í løgtinginum varð veruleiki, og so at siga einki skilagott er komið frá taljongulørinum hesum viðvíkjandi, annað enn at hann ikki hevur meira at legga aftrat í hesum máli. Hann skal gera sær greitt, at síðsta orðið neyvan er sagt, og langt frá tí. Skilaleysu viðmerkingarnar um (ó)lógliga arbeiðssteðgin, orsakað av samhuga, vóru ynkiligar á at líta. Nakað soleiðis vóru orðini: "Vit hava nú fingið loyst trupulleikan, soleiðis at steymveitingin aftur er reglulig. Øll kunnu nú verða glað, og vit eiga at hyggja frameftir. Ætli mær ikki at leggja sak ímóti viðkomandi fakfeløgum, tí tad er drúgt og kostnaðarmikið. Hetta er at leggja stein omaná byrðu hjá teimum"! Hvør skal siga, miskumsemi vinnur frama? Hetta er snøgt sagt volapykk úr enda í annan! Um maðurin billar sær inn, at tað kann lata aeg gera hjá saksøkaranum at vinna eina sak, har mótparturin verður skuldsettur fyri ávís lógarbrot, framd og grundað á valdsmisnýtslu, embætismannafusk, ósannindi og villeiðingar. Heldur hann, at ein vitnisfrágreiðing, framborin undir heilagum trygdareiði, kann rættvísgera alt hetta óskilið?

Guð hjálpi mær, hann skuldi heldur spurt sjálvan Sankta Pætur um góð ráð fyrst.